Olja finst í hvussu so er hinumegin

A kortinum siggja vit tey økir, sum Oljumálastyrið hevur valt at bjóða ut í fyrsta umfari. Sum tað sæst, so eru risastor oljuøkir ikki so langt sunnan fyri markið millum Føroyar og Bretland og sostatt ikki langt frá tí øki, sum føroyingar fara at bjóða ut

LEIF LAADAL

Økið, sum mælt verður til at bjóða ut í fyrsta útbjóðingarumfari, er umleið 14.000 ferkilometrar til støddar. Tað liggur eystan fyri og í ein landsynning úr Føroyum. Oljumálastyrið sigur, at ætlanin við at bjóða hetta økið út er at savna leitivirksemið a økjum, har møguleikarnir fyri skjott at finna olju verða mettir at verða teir bestu, samstundis sum økið verður mett at geva oljufeløgunum møguleikar fyri at kanna aðrar partar av føroyska landgrunninum.

Um vit hygga at kortinum, so vísir tað heilt klárt, at olja er ikki so langt frá tí økinum, sum nú verður boðið út, og oljumálastyrið sigur eisini beinleiðis í uppskotinum til lognu um treytir í sambandi við oljuvinnu við Føroyar, at økið er valt, tí utlitini at finna olju eru góð just a hesum økinum.

Løgtingið hevði í gjar fyrstu viðgerð av logaruppskotinum frá landsstýrismanninum í oljumalum, og tað tykist ikki at verða nakar ivi í, at løgin verður samtykt á tingi.

Sostatt sleppa oljufeløgini framat teimum mest spennandi oljuøkjunum við Føroyar beinanvegin. Hetta ma sigast at vera skilagóður politikkur, tí ið hugsað verður um tær stóru avbjóðingar, sum oljufeløgini fáa, tá farast skal undir at bora a opnum havi og í tjukka føroyska basaltið.

Tola broytingar

Treytirnar fyri at sleppa at bora og útvinna olju á føroyskum øki eru rættiliga harðar í mun til eitt nú tær treytir, sum eru galdandi beint sunnan fyri Føroyar. Tað kann nevnast, at Bretland og Írland bert taka partafelagsskatt frá teimum, sum bora og útvinna, men Oljumálastyrið leggur dent á, at føroysk avgøld og skattur skulu verða stóðug. Avgjaldskipanin skal kunna «...tola tær broytingar, ið væntandi kunnu henda við oljuprisinum, eins væl og við ilóguog framleiðslukostnaðinum», sum sagt verður í uppskotinum til log á økinum.

Skattainntøkurnar hjá tí almenna, og harvið skattaútreiðslurnar hjá oljufeløgunum, skulu kunna laga seg eftir hesum viðurskiftum á ein slíkan hátt, at tørvur ikki verður a broytingum í skattaskipanini. Altso er talan um ein breiða rammulog, har tað ikki verður nevðugt at fara í tingið, hvørja ferð oljuvinnan ger eitt upplop ella fer hinvegin.

Kann broytast

Treytirnar í Bretlandi og í Írlandi eru sum sagt lagaligari enn tær føroysku, men oljuserfrøðingar meta ikki, at hendan legan fer at halda sær, um stórar nødir av olju verða funnar afturat á bretskum og írskum økjum. Tí mælir Oljumálastyrið til, at før-oysku treytirnar verða so mikið harðar, sum lagt verður upp til.

Tað ber altið til at lækka, men skal broytingin gerast hinvegin, kunnu oljufeløgini kenna seg snýtt.

Treytirnar í fyrsta útbjóðingarumfari eru tó ikki bindandi fyri møgulig komandi útbjóðingarumfør. Tað er als ikki óhugsandi, at treytirnar í sambandi við næsta, tríðja, fjórða o.s.fr. umfar verða heilt ólíkar teimum, sum løgtingið í løtuni er í ferð við at viðgera.

Hetta eru økini, sum Oljumálastyrið mælir til, at leiti- og boriloyvi verða givin á. Sum tað sæst, liggja stór oljuøkir (Foinaven og Schiehallion) beint hinumegin føroyska økið við Hetlandsrennuna



Nýggi bygningurin verður 300 fermatrar til støddar, og verður bygdur eystur frá núverandi bygningi. Ætlanin er at nýta hann til goymslu, og til at pakka í

Palm Seafood byggir út

Palm Seafood, ið er eitt av mongu fiskavirkjunum í Vági, er í løtuni í ferð við at byggja uppi verandi virkisbygning. Hetta verður gjort eftir kravi frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni og eftir ynski frá eigarunum sjálvum, tí núverandi bygningur er heldur lítil

SIGMUNDUR OLSEN

Tá virkið varð bygt fyri fýra árum síðan, var ætlanin at virka feskan fisk. Men í staðin fyri feskan fisk hevur dentur verið lagdur a saltfiskin. Hesin er nogv meiri plásskrevjandi, av tí at hann skal liggja umleið 14 dagar, áðrenn hann kann avskipast. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur verið afturhaldandi við at loggilda virkið, tí at teir góðtaka ikki, at fiskur verður pakkaður og saltaður í sama rúmi. Plásstrotið hevur havt við sær, at sera óarbeiðsligt hevur verið a virkinum, sigur Leivur Lindenskov, ið er ein av eigarunum.

– Vit hava ikki kunnað saltað og pakkað fisk samstundis. Annaðhvørt hava vit pakkað ella saltað, og hetta hevur forðað arbeiðsgongdini á virkinum.

Nyggi bygningurin verður 300 fermatrar til støddar, og verður bygdur eystur frá núverandi bygningi. Ætlanin er at nýta hann til goymslu, og til at pakka í. Thormann Vang, byggimeistari í Froðba stendur fyri arbeiðinum, ið eftir ætlan skal verða innloðkaður, áðrenn árið er úti. Ofantaliga veðrið seinastu dagarnar hevur tó seinkað arbeiðinum nakað.

Blokkin burtur uttan inntriv førir til kreppu

Mikið ólag verður í búskapinum, um blokkurin fellur burtur, og ongi inntriv verða gjørd. Skattatrýstið tvífaldast, og arbeiðsloysið verður eini 20 prosent, segði Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, á almennum kjakfundi í Klaksvík seinasta leygardag

UNI ARGE

Sambandsflokkurin skipaði seinasta leygardag fyri kjakfundi í Klaskvík, har búskaparfrøðingurin Magni Laksafoss røddi um avleiðingarnar av, at blokkurin verður tikin burtur úr búskapinum.

Mikið ólag verður í búskapinum, um tað hendir, segði hann. Skattatrýstið tvifaldast, og arbeiðsloysið veksur nógv.

Magni Laksáfoss

Tann kreppan, sum fer at koma í kjalarvørrinum á minkandi rikisveitingum, fer at líkjast kreppuni frá nítiárunum. Tó verður hon øðrvisi á summum økjum.

Í kreppuni í nítiárunum minkaði almenni sektorurin lítið og onki, hóast vøksturin steðgaði. Tað privata virksemið minkaði rættiliga nógv, og tí gjørdist tann almenni sektorurin ein enn stærri partur av føroyska búskapinum.

Hetta hevði við sær, at høvuðsstaðarøkið, har almenni sektorurin er stórur, merkti lutfalsliga lítið til kreppuna samanborið við útjaðaran, segði Magni Laksáfoss.

Hann segði, at í eini nyggjari kreppu, sum verður skapt av minkandi rikisveitingum, verður tað fyrst og fremst almenna umsitingin, sum verður rakt. Sostatt fer tann kreppan at raka høvuðsstaðarøkið meinast.

Ein annar munur verður eisini, at niðurgongdin í búskapinum fer at vara munandi longri enn í nítiárunum, tá tað gekk afturá í eini tvey ár. Ein nýggj kreppa orsakað av minkandi stuðli fer at vara eini 10-20 ár, segði hann.

Undir kreppuni fyrst í nítiárunum fluttu fólk í øllum aldursbólkum av landinum. Í veruleikanum broytti hendan fráflyting ikki aldurssamansetingina í føroyska samfelagnum, segði hann.

Men fáa vit eina nyggja kreppu, kann roknast við, at serliga tey yngru fara at flyta. Magni Laksafoss grundaði hesa meting á, at arbeiðsplássini í almenna sektorinum fara at fækka. Hetta rakar fyrst og fremst yngra ættarlíðið. Og serliga kvinnur, helt hann.

Tey, sum verða eftir, verða fyri ein stóran part pensjonistar, og tað fer at skapa stórar samfelagslag, trupulleikar. Harafturat kann roknast við, at stórur munur verður á ríkum og fátækum, um veitingarnar falla burtur.

– Tað verða rík og fátæk í Føroyum, men trupult er at siga, hvar markið fer at verða, ella hvør verður ríkur, og hvør verður fátækur, segði Magni Laksafoss.

Fyrireikararnir voru væl nøgdir við fundin.

Eggjandi álit

Fróðskaparsetur Føroya frøist um útbúgvingarpolitikkálitið Føroyskur farleiki. Tað birtir upp undir eitt neyðugt orðaskifti, og eingin ivi skal vera um, at Fróðskaparsetrið er til reiðar at taka tann leiklutin upp á seg, sum álitið gevur setrinum.

Álitið snýr seg fyri ein stóran part um útbúgving á hægsta stigi og um gransking. Umframt ta gransking og undirvising, sum longu fer fram á Fróðskaparsetrinum og sum er ómissandi fyri varðveitslúna og menningina av tjóðarsamleikanum, setur álitið fleiri hugskot fram um nýggj evni

Gransking

Tey seinastu góðu hundrað árini hevur granskað verið í Føroyum, og tað er at fegnast um, at granskningin við hesum áliti verður sett í háseti.

Gransking er tað virksemi sum fer fram, tá ið fólk setá sær grundspurningar sum t.d. «hvussu ber tað til at ...» og uttan mun til um hetta fører til úrslit, sum beinleiðis kunnu brúkast til nakað ávist, arbeiða miðvist fyri at rokka einum haldgóðum svari. Tey sum hava til arbeiðis at granska hava universitetsútbúgving og starvast á universiteti - Fróðskaparsetrinum - ella á øðrum stovnum, sum fáast við gransking, t.d. á Fiskirannsóknarstovuni.

Gransking kann eisini snúgva seg um at fáa okkurt nýtiligt burtur úr granskingúrslitum, menna tey til ítøkiligar vørur, tænastur og mannagongdir Tá verður spurt «hvat kann hetta ella hatta úrslitið brúkast til». Slík gagnnýtt gransking - ella nýttugransking - er tað sum vinnuvirki í flestøllum førum hugsa um, tá ið tey nevna gransking. Antin skal úrslitið av granskingini vera ein nyggjur mati at gera okkurt ella til at loysa eina uppgávu, ella ein nýggj vøra ella tænasta.

Tað mesta av føroysku grundgranskingini fer fram á setrinum. Hinvegin fer tað mesta av teirri gagnnýttu granskingini, sum er í Føroyum, fram á øðrum stovnum ella virkjum, sum kortini eisini aloftast eru almenn, eitt nú P/F Fiskaaling

Samfelagsgranskingin

Álitið leggur serligan dent á at menna tá samfelagsfrøðiligu granskingina á Fróðskaparsetrinum. Hetta er eitt, sum setrið longu hevur sett frammarlaga í menningarætlan sína. Á sama hátt sum við máli og bókmentum, kunnu vit ikki vænta at onnur fara at gera rannsóknir í samfelagsligum viðurskiftum í Føroyum út frá føroyskum fyritreytum og til gagnnýtslu í Føroyum.

Setrið tekur við gleði ímóti teimum fimm samfelagsfrøðingunum, sum álitið nevnir mugu til fyri at fáa eitt virkið granskingarumhvørvi til vega , t.e. figging til at seta hesi fólk og til at skapa tað fakliga og hølisliga umhvørvið.

Vinna og gransking

Privat vinnuvirki hava ivaleyst eisini tørv á gransking fyri at mennast. Spurningurin er ikki longur hvussu nógv kann fáast burtur úr nogvum, men tvørturímóti hvussu nógv kann fáast burtur úr lítlum.

Vinnan er væl komin at venda sær til setrið at siga fra sínum hugsanum og at kunna seg um møguleikarnar. Eitt nú um tey fyrilit sum eru at hugsa um. Eitt er, at neyvar avtalur skulu vera um m.a. endamál, arbeiðslag og almannakunngerð. Annað er, at vinnuvirkið má vera til reiðar at gjalda — sponsorera - fyri arbeiðið.

Hóast tað ikki hevur verið vanligt, at universitet um okkara leiðir taka ímóti uppgávum frá privata vinnulívinum, so eiga vit at vera opin fyri hugskotinum. Setrið er altið sinnað at taka lut í orðaskiftinum um og hvussu vinnuvirki og Fróðskaparsetrið kunnu gera granskingarverkætlanir saman.

Høvuðsleiklutur Fróðskaparsetursins

Álitið mælir til at savna alla føroyska gransking á Fróðskaparsetrinum ella á ymsan hátt formliga at knyta alla granskingina til setrið. Á henda hátt verður granskingarførleikin savnaður og kann í størst møguligan mun vera samfelagnum at gagni. Hetta er ein sjálvsøgd uppgáva hjá setrinum, sum er til reiðar at taka lut í arbeiðinum fyri at finna fram til skilabestu mátarnar at fremja hetta mál.

Nýggjar útbúgvingar

Á Fróðskaparsetrinum eru gransking og undirvising tvær síður í sama mali. Umframt námini, sum setrið longur gevur í føroyskum, søgu og siðsøgu og í verkfrøði og náttúruvisindum, mælir álitið til, at tey komandi tríu árini verða nýggjar útbúgvingar settar á stovn. Nevndar eru útbúgvingar í sambandi við kunningartøkni og útbúgvingar, sum geva fólki førleika at menna nýggja vinnu í lívtøkni. Harafturat eru løgfrøði og læknafrøði nevnd.

Kunningartøkni

Kunningartøkni er eitt vítt hugtak, sum fevnir um alt frá tøkniligum viðurskiftum aftan fyri og millum eitt nú telduskiggjarnar til innihaldslig viðurskifti í málsligum og myndbornum samskifti. Innan fyri teir karmar, sum setrið hevur, verður skipað fyri tveimum tøknifrøðiligum útbúgvingum í KT: teldufrøði og ravmagnsverkfrøði. Nyggja lestrarætlanin í teldufrøðinámaninum er lagað soleiðis, at teldustøðingar (datamatikarar), sum fáa progv á Føroya Handilsskula kunnu halda fram og verða teldufrøðingar fra setrinum. Í løtuni verða møguleikarnir kannaðir fyri at bjóða teldufrøðiutbúgving á setrinum sum eina «opið seturs»-útbúgving («Open University- ella «åben uddannelse»). Útbúgvingin í ravmagnsverkfrøði er somuleiðis sera týdningarmikil fyri kunningartøkni. Er politiskur vilji til at seta útbúgvingartiltøk á hesum øki í verk, er setrið til reiðar at stíla fyri í tann mun figging fylgir við ynskjunum.

Lívtøkni

Lívtøknilig útbúgving er áhugaverd, og Fróðskaparsetrið er enn sum aður sinnað eftir figgjarligum førimuni at veita samfelagnum útbúgvið fólk, sum kunnu vera við til at bøta um grundarlagið undir vinnuligum virksemi. Tað er eingin ivi um, at tað ber til at seta lívtøkniliga útbúgving í verk, um so er at figging og fólk við tí neyðuga førleikanum verða fingin til vega.

Uttanfyri raðfestu útbúgvingar- og granskingartilmælini nevnir álitið møguleikan at seta á stovn læknafrøðiligan lestur. Eins og í sambandi við lívtøkni ber ivaleyst til at seta hetta í verk, um fortreytirnar við atliti at figg-ing og førleika verða loknar.

Fyrisiting og løgfrøði

Í 1975 var tað fyrsta álitið um hægri útbúgvingar í Føroyum lagt fram, og í tí var fyrisiting sett ovast á listan við nýggjum útbúgvingum. Tað var ikki sett í verk tá, men nú ið styrskipan er gjørd fyri løgting og landsstýri og talað verður um meira sjálvsstýri er neyðugt at hugsa um útbúgving í fyrisiting. Verða Føroyar eitt fullveldi ella verður rættarskipanin broytt í sambandi við at viðurskiftini við Danmark broytast, slepst valla undan at seta á stovn løgfrøðiliga gransking og undirvising.

Samstarv

Útbúgvingarpolitikkálitið rør fram undir fleiri samstarvsmøguleikar. Ein er at fáa tættari tilknýti í lag millum Fróðskaparsetrið og Føroya Lærareskula bæði fakliga og fralærariliga. Tað er eitt samstarv, sum eigur at verða umhugsað og partarnir kundu t.d. lagt fyri við at sett seg saman og umrætt møguleikan. Í sambandi við ta nevndu áleiðis lækna-útbúgvingina er Sjukrahúsverkið ein annar natúrligur samstarvsfelagi.

Alitið staðfestir somuleiðis tað naturliga í, at náttúruvisindaligu granskingarstovnarnir Náttúrugripasavnið og Biofar verða lagdir saman við Náttúruvisindadeildina á Fróðskaparsetrinum. Hesum tekur Fróðskaparsetrið undir við av fullum hug og arbeiðir miðvist við at eggja til, at henda samansjóðingin gerst veruleiki.

Framhald og menning

Umframt hesar nyggju leiklutir og útbúgvingar kennir Fróðskaparsetrið tað eisini sum sína skyldu at menna tey námini og ta granskingina, sum longu fer fram. Fróðskaparsetur Føroya er einasta universitet, sum burturav arbeiðir við teimum serføroysku evnunum sum mál og bókmentir, søga og siðsøga og náttúrufak, og teirri traditiónini eiga vit ikki at sleppa.

Tað er serliga eggjandi at varða av Fróðskaparsetrinum í tíðum sum hesum, tá ið uppgávurnar og avbjóðingarnar eru av slíkum slagi, sum álitið nevnir. Leggjast má tó afturat, at skulu allar uppgávurnar loysast til lítar, so er umráðandi at loysa tann stóra spurningin um tíðarhoskandi arbeiðs- og undirvisingarumstøður á setrinum.